

Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum.

# Faroe Petroleum hevði eitt gott 2014

**Jógvan Hugo Gardar**

24.03.2015 - 14:46

Oljan.fo

Hóast oljuprísurin lækkaði nógv í 2014, so er Graham Stewart, stjóri í Faroe Petroleum, nøgdur við gongdina hjá felagnum í fjør. Faroe Petroelum hevur í morgun lagt fram roknskapartølini fyri 2014.

- Tað hevur gingist gott við leitivirkseminum, serliga í sera væleydnaða Pil og Bue-loyvinum, og Njord og Hyme hava framleitt betri enn vit høvdu mett frammanundan. Eisini hava vit keypt okkum inn í gassloyvini Schooner og Ketch á bretska landgrunninum, sigur Stewart. Hann leggur afturat at tiltaksgoymslan er økt við 13 prosentum, umframt at mett mongd í loyvunum sum teir hava er økt við 49 prosentum.

Hetta vísir at vit hava valt eina góða og rætta ætlan fyri raksturin av felagnum, sigur Stewart.

Faroe Petroleum er eitt tað mest virknað felagið í Noregi, sum er skrásett á børsinum í London. Hóast torførar marknaðumstøður, ætlar felagið sær vøkstur í 2015 við eini leitiætlan, ið er fult fíggjað, og sum fær fyrimunir av norsku leitiskattaskipanini.

- Nú tá oljuprísurin er lágur, so hyggja øll eftir bæði kostnaði og fíggjarligari styrki. Faroe Petroleum er stak væl fyri, hóast oljuprísurin er lágur. Hetta kemst av at vit bæði hava gevandi framleiðslu og hava pengar á bók. Tí er Faroe Petroleum eisini klárt til at taka ímóti nýggjum avbjóðingum fyri at náa tey málini vit hava sett okkum, sigur Graham Stewart.

*Fíggjarstøðan – ein sera sterk fíggjarstøða og eitt jaligt peningarensl frá virkseminum, hóast niðurskrivingar*

• Tøkur peningur við ársenda var DKK 943 mió.

• Sølan av olju og gassi í 2014 var DKK 1.32 mia. (2013: DKK 1.32 mia). EBITDAX var DKK 602 mió. (2013: DKK 816 mió.). Lækkingin av EBITDAX kemst av einum lægri oljuprísi uppá $71 fyri tunnuna av oljulíkum (2013: $105)

• Tapið, eftir skatt, var DKK 560 mió., (2013: vinningur uppá DKK 144 mió.) eftir niðurskrivingar av framleiðsluognum uppá DKK 392 mió. (2013: DKK 21 mió.) og avskrivingar av leitiloyvum uppá DKK 1.34 mia. (2013: DKK 157 mió.)

• Leitiíløgur fyri skatt vóru DKK 888 mió. (DKK 234 mió. eftir skatt) (2013: DKK 744 mió. fyri skatt og DKK 253 mió. eftir skatt). Útbyggingar- og framleiðsluíløgur, íroknað keyp av ognum, var DKK 492 mió. (2013: DKK 494 mió.)

• Væleydnað kapitalhækkan í juni mánaða 2014 uppá DKK 662 mió., til fígging av leiti- og útbyggingarvirksemi, og møgulig keyp av framleiðslu